## Maskotturin farin á húsagang

Leiku-framleiðarin, Nici, legði fyri nøkrum árum síðani góðar 200 mió kr. á borðið, soleiðis at felagið fekk einkarrætin upp á framleiðsluna av Goleo, sum er almennur maskottur í komandi HM-endaspælinum. Sølan av maskottinum hevur tó als ikki gingið so væl, sum ætlað, og nú er felagið farið í gjaldssteðg. Hetta hevur havt harðar atfinningar mótvegis valinum av maskotti við sær. Sagt verður, at týskarar heldur áttu at valt eina ørn ella okkurt annað, sum hevði samband við Týskland, meðan onnur staðfesta, at tað hevur hildið keyparum burtur, at lítla leyvan við 6-talinum á bakinum er brókaleys.

-mørk



## Chelsea eigur mest í HM

Ikki færri enn 17 spælarar úr hópinum hjá Chelsea verða við, tá HM-endaspælið í Týsklandi verður blást ígongd um lítlan mánað. Hetta eru fleiri, enn nakað annað lið hevur. Næst flestar spælarar eigur Arsenal, sum hevur 15 HM-spælarar í sínum hópin. Síðani koma Milan (14), Manchester United og Juventus (12), Barcelona (11) meðan Al Hilal, Bayern München, Deportiva Saprissa, Dynamo Kiev og Real Madrid eiga 11 spælarar, sum fara til Týsklands at spæla.

-mørk

## Borðtennis-spælarar til Danmarkar

**Sheila Strøm, Rakul Mikkjalsdóttir og Susie Midjord úr TBF fara fríggjadagin til Danmarkar, har tær skulu kappast í donsku Grand-Prix-finalunum**

BORÐTENNIS
*Tíðindaskriv*

Einans tær seks bestu í hvørjum aldurbólki kunnu luttaka í finalunum. Sostatt hava hesar tríggjar føroysku genturnar vunnið seg fram millum seks tær bestu í Danmark, í sínum aldurbólkum.

Hesar tríggjar genturnar, luttóku fyrr í ár saman við fleiri øðrum føroyingum í sterkari kapping í Brøndby. Og eru tað úrslitini frá hesi kappingini sum hava gjørt at føroysku genturnar, kunnu luttaka í Grand Prix finaluni.

Kappingin verður sunnudagin 21. mai í Århus, men ferðalagið fer longu fríggjadagin til Danmarkar. Fríggjakvøldið og leygardagin verður venjing á skránni, og verður tað landsliðsvenjarin, Preben Larsen, sum tekur sær av hesum.

# Vilja hava felags stev

**Leygardagin skluu venjaraar, dómarar og umboð fyri føroysku fótbóltsfeløgini sessast við fundarborðið. Endamálið er at finna eitt felags stev, sum føroyskur fótbóltur kann virka eftir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Í fótbóltssambandinum vilja tey nú hava, at fokusið kring fótbóltin aftur skal setast á sjálvt spælið við bóltinum*

Dómaramistøk. Atburður hjá áskoðarum, venjarum og spælarum. Og sjálvandi eisini skrivaraborðsavgerðir.

Hetta hevur verið dagsskráin, nú nærum ein triðingur av ársins Formula-kapping er løgd aftur um bak. Og hetta er ein støða, sum FSF ikki uttan víðari vil lata standa við.

Í eini roynd at fáa meira jaligar vinklar inn á umrøðuna og fólkatosið annars um fótbóltin, hevur FSF tí sent dómarum, venjarum og umboðum fyri feløgini stevnu, har yvirskriftin eitur »Felags stev«.

Á fundinum verða ymisk viðurskifti viðgjørd – vónandi í positivum dialogi – og endamálið er so at finna eitt stev, har øll á sín hátt kunnu hjálpa til, soleiðis at fokusið í spælinum – og ikki minst hjá miðlunum – tey komandi 19 umførini verður vent móti sjálvum spælinum við bóltinum. Og ikki øllum møguligum øðrum faktorum, sum viðhvørt hava hug at tykjast avgerandi.


## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






**Hvar er bólturin?**

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.